

# SIC í avstralskum útvarpi

**Tónleikurin hjá Sic verður í dag at hoyra í sendingini Aussie Invasion á alnet útvarpsstøðini Dark Cloud Radio**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

Í gjár bóru vit tíðindini um, at fyrsta fløgan hjá Sic verður givin út mánadagin 26. februar. Hetta til frægd fyri nógvar føroyskar tungmálms fjepparar. Men eisini aðrastaðni gleðir fólk seg til, at Føroya tyngsti bólkur verður at fáa á fløgu. Sic hevur havt fleiri løg liggjandi á síni myspace síðu, og hesi hava vakt ans kring heimin. Bólkurin sigur, at nógv áhugaverd sambond eru komin í lag. Tað fyrsta av hesum gevur úrslit í dag. Kl. 15 føroyska tíð verður SIC spælt á einari Australskari alnet útvarpsstøð, ið eitur Dark Cloud Radio. Umframt at spæla løg við bólkinum verður eisini tosað um bólkin. Hetta verður í sending, ið eitur Aussie Invasion. Dark Cloud Radio hevur slagorðið: Heavy, Hard, Dark or Just Anything That Rocks og leggur seg eftir at spæla harðan rokk.

Eddie úr Sic sigur:

- Teir funnu okkum gjøgnum MySpace og hava síðani havt stóran áhuga fyri bólkinum og skriva regluliga til okkara.

Sambært tungmálmsbólkinum eru fleiri onnur áhugaverd ting fyri framman, og at hesi skjótt fara at koma fyri ein dag, men tað skilst, at bólkurin er í samband við fleiri aðrar útvarpsstøðir kring heimin. Fyri Sic er hetta møguleiki fyri at koma nærri dreyminum um eitt altjóða gjøgnumbrot. Fyri ein bólk, ið liggur á einum so smølum marknaði sum Sic, er tað alneyðugt at fáa so nógv sambond kring heimin, sum til ber. Tí marknaðurin um heimin er als ikki lítil.

Vitja Darkcloud Radio á darkcloudradio.net

HANDILIN

## Spennandi sølustarv á Kambsdali

### - Nýggj deild hjá LM Handlinum

Søkt verður eftir einum sølufólki, ið hevur áhuga, hugflog og initiativ til at vera við til at menna LM Handilin.

**Vit kunnu bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði innan handilsyrkið. Vit hava gott 65 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Tú fært gott innlit í nógv viðurskifti, so sum sølu, innkeyp og marknaðarføring.

Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Høvuðsuppgávur**
- Samskifti við viðskiftafólk og leverandørar.
- Søla av hvítvørum og radio/sjónvarpsútgerð.
- Marknaðarføring.
- Innkeyp.

**Krøv til starvið**
Tú mást hava áhuga fyri økinum, og best hevði verið, um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú:
- Ert fyrikomandi og kundavinaligur.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst orðna fleiri ting í senn.
- Ert arbeiðssamur, røkin, fyrikomandi og hugagóður til hetta arbeiði.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, tínar starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jarnhold Nattestad (jarnhold@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. februar 2007.

p/f Leif Mohr Hoyvíksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo

TEAM85

Klaksvíkar Kommuna / Virkishúsið fyri Ung



## Pedagogur / lærari ella hjálparfólk til Virkishúsið fyri Ung

**Í sambandi við at eitt av okkara starvsfólkum hevur sagt seg úr starvið, verður við hesum søkt eftir einum pedagogum/lærarum ella hjálparfólkum at byrja skjótast gjørligt.**

Arbeiðstíðin er 22 tímar um vikuna. Um umstøður verða til tað, er møguleiki fyri, at starvið seinni kann verða uppnormérað til longri arbeiðstíð, um hetta hevur áhuga hjá viðkomandi starvsfólki.

Sóknast tú eftir einum ungum og livandi starvsumhvørvi? So er Virkishúsið fyri Ung í Klaksvík kanska júst arbeiðsplássið til tín.

Virkishúsið er fyri ung millum 10 og 18 ár. Ætlanin er at bjóða ungdóminum eitt breitt úrval av ítrivs- og frítíðarmøguleikum millum kl. 15.00 og 22.00 hvønn gerandisdag. Umframt hetta er eisini ætlanin at hava verkstaðir av ymiskum sløgum í vikuskiftunum. Umsøkjarin má tí rokna við eisini viðhvørt at arbeiða í vikuskiftunum.

**Vit væntað, at umsøkjarin**
- hevur áhuga í at arbeiða við børnum og ungum
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er eldhugaður og jaligur
- kann vera íbirtari og hevur skapanaráhuga
- hevur góð samstarvsevni
- kann saman við leiðaranum skipa fyri tiltøkum til frama fyri børn og ung
- fylgir við og kunnar seg um menning á økinum

**Vit kunnu m.a bjóða**
- eitt ungt og livandi arbeiðsumhvørvi
- ávirkan á egið starvspláss
- skiftandi arbeiðstíðir
- pláss fyri persónligari menning
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur

**Setanarviðurskifti**
- størvini verða lønt í sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og KAF (Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya):
  - Pedagogar / lærarar, lønarstig 10-16
  - Hjálparfólk, lønarstig 1-5
- verður at tola bygnaðarbroytingar

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Beintu Árnadóttir Gregersen á telefon 458510 ella 281810

Umsóknir, saman við møguligum viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum, skulu verða Virkishúsinum, Klaksvíksvegur 57, 700 Klaksvík í hendi **í seinasta lagi 19. februar 2007.**

## Virkishúsið fyri Ung

cre8 458006

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo